# 8 spurningar um jól

***Hvat er tað besta við jólum?***
At vit menniskju, hóast alt resið, hava valt at minnast Jesus á ein serligan hátt hesar dagar. Men tað besta er tó, at Hann ikki hevur avmarkað seg til hesar dagar, men at okur hvønn dag kunnu njóta sambandið við Hann.

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
Hugsanin um hvussu hánt menniskjað letur um tilboð Guds um frið á jørð. Eg hugsi um øll tey, ið sjálvt jóladagarnar líða undir bardøgum, kríggi og einum manglan úrslitaleysum stríði fyri at vinna sær mest neyðugu føðina. Tað var ikki ætlan Faðirsins, tá Hann sendi Frelsaran.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Í friði og tryggleika hjá foreldrum mínum innast í Trongisvági. Jólatræ var ikki altíð á skránni. Men gásin var fastur partur. Og so samfelagið í Salem, har okur sungu og hoyrdu evangeliið borið fram.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Tíverri verða elsti sonurin og konan ikki heima hesi jól, men næstelsti kemur heim at vera jóladaganar, og tað gleða vit okkum nógv til. Jólaaftan verður hildin við familjuni her í Havn, njóta friðin og hvíldina, tó at eg ein part av jólaftan havi læknavakt. Annars verður familja vitjað og okkurt møti fara okur til.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Friður verði við tí, bara vit ikki gloyma tað týdningarmesta-Jesus.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Ja- fyrstu ferð var í 1975- tá var je púra einsamallur í 10 dagar á Trillegårdskollegiet í Århus. Tað kendist tungt, men je sá fram til at sleppa heim tá próvtøkan var liðug mitt í januar. Seinni hava okur sum hjún og familja hildið jól - eisini í Århus - og tí hava okur bara góð minnir frá.



***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Mær dámar væl at keypa jólagávur - og hugflognum bilar einki.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Fløgur og bøkur. Av fløgum ynski eg mær nýggjastu av Ingumay Hørnberg. Av bókum eina nýggja um kor teirra trúgvandi í Kina, og annars onkra av teimum nýggju føroysku, ið eru - og fara at koma.

























